


# Leiðreglur fyri bílegging av kanningum frá Røntgendeildini á Diagnostiska Deplinum

## Endamál

At  virka fyri so skynsama nýtslu av tilfeinginum sum gjørligt til størst møguligt gagn fyri viðskiftafólkini.

## Innleiðing

Røntgendeildin á Landssjúkrahúsinum ger eina longri røð av myndadiagnostiskum kanningum og viðgerðum (Røntgen, CT, MR, UL, Mammografi, Intevention). Kanningar verða bílagdar bæði innanhýsis á sjúkrahúsinum, av kommunulæknum og serlæknaviðtalum. Eisini ger deildin lýsing av røntgenkanningum frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Farnu árini hevur verið ein støðugur árligur vøkstur í talinum av kanningum um leið 8 % samlaður vøkstur og um leið 15 % vøkstur í CT -skanningum. Síðstnevndu eru fyri røntgenlæknarnar tíðarkrevjandi kanningar.

Røntgendeildin hevur árliga játtan á fíggjarætlanini innanhýsis hjá Diagnostiska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Avbjóðingin hjá deildini er, at kunna hava eina so skynsama nýtslu av játtanini sum gjørligt, soleiðis at hon røkkur til neyðugt virksemi alt árið til størst møguligt gagn.

Flestu av bíleggingunum, sum koma frá eindum uttanfyri sjúkrahúsini eru í løtuni uttan avrokning yvirfyri bíleggjarunum. Undantak er fyri kanningar í samband við vinnubrøv, innfaraloyvir, luttøku í ítróttarkappingum o.l., ið ikki eru grundaðar á sjúkuillgruna. Í tí førinum er egingjald, sí leiðreglu fyri hesar kanningar.

Endamálið við hesum leiðreglum er at virka fyri, at tilfeingið hjá røntgendeildini verður brúkt optimalt í mun til givnu figgjarligu-, tóla- og starvsfólkakarmar til gagns fyri sjúklingar og heilsuverkið og at stuðla undir góðum sjúklingagongdum. Røntgendeildin er tænastueind fyri heilsuverkið, og ynskir at veita tænastur á høgum stigi, at vera ein skikkaður samstarvsfelagi og at hava gott samskifti um tænasturnar.

## Bíleggingarskipan /-mannagongd

Í verandi bíleggingarmoduli  í THS ber sum útgangsstøði tekniskt til hjá øllum læknum at bíleggja eitthvørt slag av kanningum á listanum. Tó so, at fleiri kanningar sum útgangsstøði eru ætlaðar serlæknum á sjúkrahúsum at bíleggja ella at bíleggja í samráð við slíkan – sí fylgiskjal 1 við nærri greining av, hvørjar kanningar ymsu sløgini av læknum kunnu bíleggja.

Fyri sjúkrahúslæknar ber til at bíleggja hastikanningar – hesar kunnu um neyðugt gerast allar tíðir á samdøgrinum.

Ávísingar skulla innihalda neyðugar kliniskar upplýsingar, ið liggja til grund fyri kanningini. Týðandi er, at ávísandi lækni hevur gjørt sær greitt avleiðingarnar og fyrimunirnar við kanningini. Gevast skal serliga gætur um kvinnur, ið verða ávístar, eru við barn.

Røntgendeildin tilskilar sær rætt til í summum førum at venda sær til bíleggjandi lækna og umrøða viðurskiftini.

## Alternativar kanningar v.m.

Røntgendeildin tilskilar sær rætt til at vísa bíleggjandi læknanum á møgulig betri og/ella bíligari alternativ til gjørdu bílegging ella at spyrja nærri um grundgevingina fyri gjørdu bílegging. Eisini tilskilar Røntgendeildin sær rætt til at venda aftur við uppskoti til eina stigvísa eskalering av kanningum. Í summum førum kann Røntgendeildin velja at broyta kanning, um tað er eyðsæð, at tað eigur at verða gjørt.

## Myndadiagnostiskar kanningar í øðrum londum

Yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum kunna ávísa sjúklingar til ávísar kanningar í útlondum, ið ikki verða gjørdar í Føroyum.

## Brúka THS

Allar bíleggingar skulla gerast í THS uttan so, at heilt serligar umstøður gera seg galdandi, har serlæknin ikki hevur atgongd til THS t.d. koyrilæknar o.l.

## Prísupplýsing um kanningar

Røntgendeildin umhugsar, um tað hevði verið gjørligt, at fingið sett vegleiðandi kostnaðin fyri kanningar inn í bíleggingarskipanina, ella sum alternativ at leggja ein vegleiðandi príslista út á heimasíðurnar hjá sjúkrahúsunum. Støða verður tikin til spurningin í endanum av 2013.

## Heimasíða/vegleiðingar v.m.

Røntgendeildin fer í 2013 at hava øki á ls.fo har til ber at fáa upplýsingar um viðkomandi viðurskifti á Røntgendeildini

Referancer

DDKM 2. útgáva/standardur 2.4.1

**Fylgiskjal 1**

**Styttingar:**

YL=yvirlækni(serlækni)

HL=hjálparlækni

KML=kommunulækni

| | **ÁVÍSARI** |
|---|---|
| **BEINAGRIND:** | |
| Ekstremiteter | HL KML YL |
| Columna | HL KML YL |
| Skoliosumyndir | YL |
| **MAGA-TARMKANNINGAR:** | **KANNING** |
| Oesophagus | HL KML YL |
| Ventrikel | YL |
| Tarmpassage | HL KML YL |
| Oversigt over abdomen | YL |
| Colonindhældning | YL |
| **UROGRAFI:** | HL KML YL |
| **THORAX** | HL KML YL |
| CholangiografiFlebografiFistulografi | YL |

| | |
|---|---|
| **ULTRALJÓÐ-KANNINGAR:** | |
| Carotis | YL |
| Thorax | HL KML YL |
| Aorta | HL KML YL |
| Ovara abdomen | HL KML YL |
| Niðara abdomen | HL KML YL |
| Nýru/hjánýru | HL KML YL |
| Bløðru | HL KML YL |
| Scrotum | HL KML YL |
| Doppler – ekstremiteter | YL |
| **UL/RTG:** | |
| Nefrostomi | YL |
| **ULTRALJÓÐLEIÐBEIND PUNKTUR/** | |
| Pleuracentese | YL |
| Anlæggelse af pleuradræn | YL |
| Acitis drænage | YL |
| Nyrecyste tømning | YL |
| Pancreasbiopsi | YL |
| Abdominal proces | YL |
| Abses drænage | YL |
| LIvurbiopsi | YL |
| Axil | YL |
| **CT KANNINGAR:**<br>**Cerebrum**<br>**Col. Lumb** | <br>HL KML YL<br>HL KML YL<br>YL |
| **MR KANNINGAR:** | YL |

Hjálparlækni kann bíleggja YL-merktar kanningar, um umbiðið av yvirlækna, sum skal nevnast í ávísingini.

**Røntgendeildin**

Røntgendeildin ger kanningar við røntgen, ultraljóð, CT-skannara og magnetskannara (MR-skannara).

Hesi kunnu ávísa til røntgenkanning:

- Kommunulækni
- Serlækni
- Ambulatorium
- Skaðastova
- Seingjadeild

Harumframt verða ymiskar viðgerðir gjørdar á innløgdum sjúklingum við ultraljóð- og røntgenleiðbeining.

Øll viðskiftafólk skulu møta í móttøkuni á 2. hædd í B-bygninginum.

**Upplatingartíðir**

Opið fyri ambulantum sjúklingum gerandisdagar: kl. 08.00 – 12.00

**Telefonnummar**

304500, lokal 5500

**Faxnummar**

317134

**Telefontíðir**

Gerandisdagar: kl. 09.00 – 11.00

**Leiðslan/ábyrgdarhavandi á Røntgendeildini á Diagnostiskadeplinum**

Jógvan Dahl Niclasen, leiðandi á Diagnostiska deplinum.

Ragna Reinert, deildarsjúkrarøktarfrøðingur

Sjúkrahúsverk Føroya